Orð: Maud Næs
Myndir: Jens Kristian Vang

# AFS – ein altjóða felagsskapur

**Bakgrundsssøgan**

AFS International er ein skiftisfelagsskapur fyri ungdómar. AFS felagsskapurin snýr seg um, at ung fólk millum 15 og 18 ár fara út í heim í eitt ár fyri at nema sær kunnleika um annað mál og aðra mentan, og at ungdómar á sama hátt koma hendavegin fyri at fáa nýggjar avbjóðingar. Tað mennandi og potentielt læruríka aspektið er, at einstaklingurin og familjur av ólíkum uppruna læra um og av hvørjum øðrum við at liva saman.

Søgan hjá AFS byrjar undir 1. heimsbardaga við einum bólki av sivilum amerikankum ungdómi, ið stovnaðu American Field Service. Hesir ungdómar gjørdust ambulansuførarar bæði undir fyrra og seinnra heimsbardaga. Hesi sjálvbodnu koyrdu og fluttu tey særdu av vígvøllum og upplivdu soleiðis ræðuligu avleiðingarnar av krígsførslu og manglandi fatan og virðing fyri øðrum menniskjum og mentanum.

Burtur úr hesum kom hugskotið um, at ung fólk tvørtur um landamørk, og harvið tvørtur um mentunarligar, átrúnarligar, rasu, málsligar, politiskar og fíggjarligar munir skuldu læra hvønn annan betur at kenna við at liva seg inn í m.a. mentanina hjá hvørjum øðrum.

**AFS til Føroyar**

Í 1947 bleiv altjóða felagsskapurin AFS Intercultural Programs formelt settur á stovn. Tíggju ár seinni, í 1957, bleiv AFS Interkultur í Danmark sett á stovn. AFS er heimsins elsti skiftisfelagsskapur og er í dag í yvir 60 virknum limalondum. Arbeiðið er sjálvboðið og samstundis óheft av vinnuligum, partapolitiskum og átrúnaðarligum áhugamálum.

Føroyar eru ikki sjálvstøðugt limaland, men eru eitt lokalfelag við tilknýti til AFS Interkultur í Danmark, eitt lokalfelag myndað av sjálvbodnum. Fyrstu føroyingarnir fóru út í heimin gjøgnum AFS síðst í 50unum og fyrst í 60unum, so AFS hevur virkað her á landi í hálva øld, og hátíðarheldur 50 ára dagin í ár.

"Málsetningurin hjá AFS-Føroyum er tvífaldur. Tað fyrra er at fyrreika og kunna tey, sum fara uttanlands við AFS, og hin parturin er at vera stuðlar hjá vertsfamiljum og at skipa fyri tiltøkum fyri teir ungdómar, sum koma til Føroyar í eitt ár. AFS Føroyar sendir umleið 15-20 ungdómar úr Føroyum út í heim árliga, men trupult er at finna føroysk heim, ið vilja lata dyrnar upp fyri útlendskum skiftisnæmingum. Tó eru glottar, tí í løtuni sita seks familjur spentar kring landið og bíða eftir einar nýggjari dóttur ella soni, ið kemur til landið um eina lítla viku«, sigur Elisabeth Holm, forkvinna í AFS í Føroyum síðan miðskeiðis í 90unum.

**AFS visiónin**

Endamálið við AFS er at virka fyri friði í heiminum, at økja um tilvitskuna um tað, sum vit menniskju hava til felags, at virka fyri størri fatan av heimsins mongu og fjølbroyttu mentanum og at stríðast ímóti vandamálum, ið hótta heimssamfelagið. AFS ásannar, at friðurin ikki er sjálvsagdur, men hóttur av samfelagsligum, búðskaparligum og politiskum órættvísi eins væl og av vantandi fatan av øðrum átrúnaðum, bæði millum tjóðir og einstøk lond.



**Samrøða við Elisbeth Holm AFS-ara og forkvinnu fyri AFS í Føroyum.**

– Eg var í Kansas City í statinum Kansas í 1982 hjá familjuni Cantril. Faðir mín har hevði lisið gudfrøði og sálarfrøði, men arbeiddi sum sálarfrøðingur. Mamma mín har hevði ein skúla í kjallaranum heima, har hon lærdi 5-6 ára gomul børn at lesa. Eg hevði ein beiggja og tvær systrar, onnur var flutt heimanfrá og var gift við littum mann. Foreldrini høvdu ongan trupulleika við tí, men omman, ið var av landinum, hevði stórar trupulleikar við tí. Soleiðis fekk eg tíðliga og beinleiðis innlit í rasuskilnaðin og trupulleikarnar í USA. Hin sistur mín, Lisa, var 16 ár, búði heima og vit vóru ikki bara systrar, men bestu vinkonur.

- Vit hava havt samband øll árini síðan.Tey hava vitjað meg og eg havi vitjað tey. Vit fylgja við í lívinum hjá hvørjum øðrum. Eg eri ótrúliga glað fyri AFS-árið í USA. Tað hevur ávirkað øll míni virði, heims- og menniskja áskoðan Tað hevur lært meg, hvat menniskju hava í felag. Tað er so nógv meira enn tað ið skilir okkum at.Eg føli meg kensluliga tætt knýtta at AFS-familju míni í USA, og ikki minst at AFSarum mínum úr USA og Sveis. Hetta eru sambond, ið hava ríkað lív mítt meira enn lýsast kann í orðum. Sjálv haldi eg, at AFS er eitt frálíkt íkast til føroyska samfelagið.

**Samrøða við Lilju Holm Mortensen, ið er 16 ár:**

– Eg eri júst komin heim aftur úr Argentina. Eg havi búð í einum av teimum norðastu statunum, Formosa, í býnum Formosa Capital, har umleið 300.000 fólk búgva. Eg havi neyvan eina vanliga AFS-søgu, tí eg havi búð hjá 3 familjum gjøgnum hetta árið. Eg havi búð umleið 3 – 4 mánaðir hjá hvørjari familju. Gjøgnum hesar 3 familjur havi eg upplivað 3 heilt ymiskar heimar, og tað hevur verið sera áhugavert og læruríkt hjá hvørjari, hóast tað eisini hevur verið strævið og trupult.

Tann fyrsta familjan eg kom inn til, var ein sera rík familja. Tey høvdu eitt stórt hús við tænastufólki, svimjuhyli og vóru sum heild materialistiskt væl fyri. Út frá upplýsingunum um familjuna áðrenn eg kom hagar, fekk eg fatanina, at tey vóru sera lík mínari familju her. Tey høvdu somu áhugamál og enntá sama yrki sum foreldur míni. Pápin var verkfrøðingur og mamman var ensktlærari og arkitekt eisini. Hóast tað, vísti tað seg, at tey vóru sera ólík foreldrum mínum. Tey vóru sera konservativ og heldur køld. Tað er vanligt har, at mannfólk eru dominerandi, men í hesum føri var tað heilt ekstremt.

3 mánaðir seinnri flutti eg til mín kontaktpersón innan AFS. Har búði eg saman við henni, mammuni og einari yngri systur í 4 mánaðar. Økið eg flutti til var eitt tað fátækasta og vandamiklasta í Formosa. Familjan var heit og kjerlig, men fátøk. Eg búði sera primitivt, t.d. var ongin vaskimaskina ella onnur materiel hjálpartól. Eg deildi kamar við eldri systrini og hevði bert eina madrassu at sova á. Aftaná 7 mánaðar í Argentina flutti eg aftur, hesu ferð tí mamman hevði hvørki menniskjansligt ella peningaligt yvirskot til at hava meg búgvandi. Hóast eg flutti høvdu vit framhaldandi eitt støðugt samskifti.

Triðja og síðsta familjan, var familjan hjá besta vinmanni mínum í Formosa, sum tók um endan, og tað eri eg ótrúliga glað fyri. Hóast flutningin millum familjurnar, føldi eg, at eg endiliga kom heim til mína røttu familju í Argentina.

Av tí at eg fyrst kom at búgva hjá einari vælhavandi familju, bleiv eg koyrd í ein privatan handilsskúla, ið var væl fyri samanborið við aðrar skúlar har, tó fátækur. Skúlin var authoriterur, og har var nógv disiplin. Vit skuldu hava fullan uniform hvønn dag og vit høvdu hvør sær eina lílta bók um atburð. Loyvt var at missa 15 dagar árliga, áðrenn burturvísing, tó skuldi grundgeving frá læknanum fylgja við, um tú var burtur ein dag. Men sum allastaðir í Argentina, ið er korrupt, so enntá í skúlanum kundi man keypa sær 15 dagar meira. Men hóast alt hetta, er skúlaskipanin ikki serliga góð, tí tey høvdu ikki skúlabøkur, og í veruleikanum var undirvísingin rein avskrift. Tað var fínt at ganga á skúlanum, hóast handilsskúli als ikki er eg, men fyrst eftir summarfrítíðina í desembur, januar og februar, fann eg útav, at talan var um ein handilsskúla. Eg fekk møguleikan at skifta skúla, men helt fram, tí her hevði eg míni bestu vinfólk.



Samanumtikið havi eg havt eitt fantastiskt ár. Tað hevur verið sera hart til tíðir, men tað havi eg lært nógv av, og tað hevur ment meg sum menniskja. Eg føli, at eg kenni meg sjálva og míni virði betur. Eg ætli at hava neyvt samband við mína familju og míni vinfólk í Argentina. Eg havi longu ætlanir um at fara til Argentina komandi summar at vitja, men fyrst fari eg á Studentaskúlan í Hoydølum og at arbeiða av og á fyri at fáa pening til mína framtíðar ætlan.

**Samrøða við Stephanie Elisabeth Sager 21 ár úr Luzern í Sveis, sum var AFS-ari í Føroyum fyri trimum árum síðan.**

– Eg valdi at koma til Føroyar, tí eg vildi til eitt norðurlendskt land. Eg havi ferðast við familju míni í Danmark, Svøríki og Noreg sum barn og tað dámdi mær sera væl. Tá eg kom til AFS, søgdu tey, at um man ynskti at koma til Danmarkar, so var eisini møguligt at velja Føroyar, tá visti eg als onki um Føroyar.Síðan byrjaði eg at lesa um Føroyar, og mær dámdi alt eg las um mentanina og fólkið.

Í byrjanini var tað trupult við málinum, tí eg dugdi ikki so væl enskt og als ikki danskt. Fólk í Sveis duga ikki so væl enskt, tað er mest týskt og franskt. Tað var ringt at skilja, hvat hendi á studentaskúlanum í byrjanini, men so kom eg at skilja meir og meir. Eg gjørdi eina orðabók fyri meg sjálva, har eg skrivaði øll orð eg ikki visti og spurdi Elisabeth og